## Stórskjúttar upp á spæl

Longu í fyrsta umfari vóru stórskjúttar upp á spæla í næstbestu deildini. Á Sandi van B71 7-0 á KÍ, og har skoraði Clayton Soares fýra av málunum. Soleiðis var eisini í Gundadali, har Heini Gaard skoraði fýra av teimum sjey málunum hjá HB í sigrinum á Sumba/VB. Á Argjum var Allan Mørkøre stóri maðurin, tí hann gjørdi trý av teimum fýra málunum, sum AB skoraði ímóti Royn.

Tríggir spælarar skoraðu tvey mál í fyrsta dystinum í 1. deild leygardagin – teir vóru Magnus Olsen hjá B71, John Eystberg hjá HB og Birgir Joensen hjá FS Vágum 2004.

## Beckham vil hava skil í



Enski fótbóltsspælarin David Beckham hevur hildið loyniligt, at hann líður undir einari sjúkligari trogd til ordan. Colafløskurnar í køliskápinum skulu liggja í symmetriskum ordan, og bløðini skulu liggja í beinari røð á borðinum. Hetta skrivar Sky News, sum vil vera við, at David Beckham hevur Obsessive Cumpulsive Disorder.

Sambært Sky News hevur Beckham fjalt hetta fyri liðfeløgunum í Real Madrid, tí hann varð illa argaður av spælarunum í Manchester United orsaka av hesum.

– Eg havi roynt at sleppa av við hetta, men tað ber ikki til, sigur David Beckham.

HB-ÍF 5-1 (1-0):

# Várhýrur

HB

ÍF

**Ungdómsins kæti slapp framat í yvirmát, tá HB so ruddiliga blakaði ÍF til hús við lemjandi 5-1**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bæði liðini í Gundadali sunnudagin sannførdu um tær gitingar, sum undan árinum hava verið settar til liðini í Formula-deildini. Her hava tey nógvu gitt, at HB - hóast stóra útskifting - aftur í ár verður millum liðini, sum amast at avgjørda toppinum, meðan ÍF hinvegin fær tað sera trupult í niðara endanum av stigatalvuni.

### Rasmus og fríspørkini

Júst tann fatanin mundi eisini vera tann, sum áskoðararnir í Gundadali sótu eftir við. Frá byrjan tóktust fuglfirðingarnir í øllum førum at hava ásanna, at teirra leiklutir var í verjupartinum, og tí vágaðu teir sær sjáldan nakað serligt niðaneftir.

Hetta gav HB mest sum fullkomna spæliyvirvág, og møguleikar spurdust eisini burturúr. Tað skuldi tó ein av teimum eftir hondini so væl kendu deyðbóltsstøðunum til hjá HB, áðrenn hol kom á. Úr 35 metrum royndi Rasmus Nolsøe seg við frísparki, og hesum megnaði Karstin Joensen í málinum ikki halda av vandaleið.

### Málið opnaði alt

Málið hevði við sær, at ÍF eftir steðgin noyddist longur niðan á vøllin í royndini av javna, og tað gav rúm til HB. Tað gingu bara fáir minuttir, so var 1-0 broytt til 3-0 á máltalvuni, og so spruttaðu ungu HB-spælararnir av sjálvsáliti. At eitt mistak nakað seinni førdi við sær, at ÍF fekk svarað aftur, hevði sum so ikki tað stóra uppá seg, tí nær nøkrum veruligum spenningi komu fuglfirðingar sjáldan.

Ístaðin vóru tað enn einaferð tveir av ungu HB-monnunum, sum kundu staðfesta trivaliga sigurin, sum í fyrstu atløgu hevur sent HB í topp – og ÍF í botn – á stigtalvuni.

### Óvissan burtur

Hóast talan til tíðir var um hampuliga laka mótstøðu, sum HB fekk í dystinum, so man sigurin fyrst og fremst muna væl á kontini fyri sjálvsálit. At liðið er sett saman av fleiri av frægastu ungu fótbóltsspælarunum, sum vit eiga her á landi, munnu fá vera í iva um. Men júst ungdómur og óstøðugt spæl hanga ofta saman í fótbóltshøpi, og tí man sigurin meira enn nakað hava tikið óvissuna um egnan mátt burtur.

Hjá ÍF er kanska ilt at síggja, hvat sigurin skal brúkast til. Men liðið fekk í øllum førum staðfest, at bindingarnar afturi á vøllinum eiga at vera størri og betri tilvitaðar. Ikki minst, um roynt verður at flyta spælið frameftir.

### HB-ÍF 5-1 (1-0)

1-0: Rasmus Nolsøe, 35.
2-0: Rókur av F. Jespersen, 46.
3-0: Jákup á Borg, 49.
3-1: Atli Petersen, 69.
4-1: Páll M. Joensen, 73.
5-1: Johan E. R. Mouritsen, 90.




*Jákup á Borg var sera vælupplagdur, tá HB sunnudagin legði frá landi í Formula-deildini við trivaligum stórsigri*

## Sparki altíð eftir málinum

Sum vera man, so var lagið á HB'arunum í toppi eftir dystin móti ÍF. Eftir dystin fingu vit orðið á Rasmus Nolsøe, sum í ár tykist fáa ein enn meira týðandi leiklut á liðnum, enn hann hevði tað í fjør.

– Tað var sjálvandi deiligt at vinna, men ikki minst, so haldi eg tað vera gott, at vit fáa somikið nógv mál burtur úr yvirvágini.

Sjálvur skeytst tú enn einaferð mál við beinleiðis frísparki. Hesa ferð úr 35 metrum. Er tað vanligt, at tú skjýtur eftir málinum úr slíkari fjarstøðu?

– Í øllum førum, sum liðið hjá okkum er nú. Vit hava fáar spælarar, sum veruliga kunnu hótt við deyðbóltum, og tí ræður bara um at knalla til.

Og er tað nakað, sum tú venur serliga nógv?

– Tað veit eg ikki. Um veðrið er gott, so kann eg væl standa eina løtu eftir venjingina, men tað er ikki nakað, sum eg havi lagt í nakra serliga fasta legu, sigur skotsterki tvøramaðurin at enda.

**-mørk**

**Annars haldi eg**

*Tað var samba-veður í Gundadali í dag, men fuglfirðingar høvdu ikki hug at dansa saman við hinum – Sofus Nolsøe, Hoyvík*